

*Lisa Ferderiksberg á palli í Kelduni á páskum í fjør. Sangurin er hennara hjarta mál*

*Mynd: keldan.fo*

# – Orðini bara sjungaðu í høvdinum

Nýggja fløgan hjá Lisu Frederiksberg er vorðin sonn fólkaogn. Hetta er ikki minst takkað verið høvuðssanginum "Reis teg upp". - Tað var ein serstøk løta, tá hesi orðini komu til mín, sigur Lisa m.a. í hesi samrøðuni.

SONGKVINNA
*Snorri Brend*

**Keldan:** Tað er møti í Kelduni. Vit eru fyrst í september mánaði 2004, og vígslan av hesum stóra samkomubygninginum er á skránni hetta vikuskiftið.

Nógv arbeiðið er lagt í at fyrireika og skipa alt so væl, tí bæði gestir úr Føroyum og útlondum eru komnir til vígsluna.

Talarar, kokkar og mong onnur hava havt úr at gera hesar dagarnar við fyrireikingini. Men tað vóru onnur, sum eisini vóru í sving hesa tíðina.

Úti á Strondum gekk ein ung kvinna við einum í huga: - Eg ynski at gera ein sang til hesa vígsluna. Hann skal verða mítt íkast til hátíðarhaldið.

Sangurin kom til hana, bæði í orðum og lagi, og á vígsluhátíðini varð hann framførdur til stóra gleði fyri tey hundraðtals fólkini sum vóru í Kelduni hetta vikuskiftið. Sangurin "Reis teg upp" var gávan hjá Lisu Frederiksberg til samkomu sína við hetta høvið.

Hesin sangurin hevur síðani gingið sína sigursgongd kring landið, tí tað er neyvan dagur at hann ikki verður spældur á onkrari av teimum trimum útvarpsrásunum.

Hann er ikki vorðin minni spældur kring landið, nú Lisa Frederiksberg hevur givið hann út á fløguni við sama navni.

- Kann hesin sangurin og fløgan verða til troyst og gleði fyri onkran, so var hon ikki givin út til fánýtis, sigur Lisa Frederiksberg.

### Tók sín tíð

Sangur hevur altíð havt nógv at siga í lívinum hjá Lisu. Og hugskotið at geva út eina fløgu er tí heldur ikki nýtt.

- Alt tað sum eg kann minnast, so havi eg sungið. Og so líðandi gjørdist hetta líkasum ein partur av míni andaligu tænastu, greiðir Lisa frá.

Hon var við á fløguni sum Keldan gav út fyri árum síðani við heitinum "Í Guds faðirs hjarta", men sjálv hevur hon ikki givið út nakra fløgu áður.

Ikki fyrrenn í farna mánaði:

- Hetta hevur verið ein dreymur hjá mær í langa tíð. Men um somu tíð visti eg, at hetta var bæði kostnaðarmikið og ikki minst tíðarkrevjandi.

- Tí tók tað sína tíð at fáa hesa fløguna út, sigur Lisa.

Hon hevur verið virkin sangari í samkomuni, og hevur fleiri ferðir fingið fyrispurningar frá fólki um, hví hon ikki gav eina fløgu út.

Tað hevur tikið sína tíð at koma so langt, og hetta seinasta árið hevur tann komandi fløgan staðið ovarlaga í hugaheimi hennara.

Fyrr í ár var hon so í studio hjá JakZak í Havn, meðan tónleikurin er framleiddur í studio í USA.

### Fann gamlan tekst

Á fløguni eru sangir, sum onnur hava skrivað, men eisini sangir sum Lisa sjálv hevur skrivað. Onkrir eru skrivaðir í nýggjari tíð, meðan onkur teirra er av munandi eldri dato.

Ein av hesum heldur eldru sangunum er sangurin "Ungur á Guds vegi", sum hon kom fram á fyri eini tíð síðani.

- Eg havi av og á fest okkurt á blað, men hesin sangurin og lagið til hann, - tey er í øllum førum rættiliga gomul.

- Ja, tey vóru í veruleikanum so gomul, at eg ikki mintist til lagið!, greiðir Lisa brosandi frá.

Hon kom fram á sangin ein dagin, hon hugdi í sangmappuna, sum hon plagar at brúka, tá hon syngur til møtir og aðrastaðni.

- Orðini vóru har. Men lagið, - tað var bara vekk!

Henni dámdi kortini orðini væl, tá hon las tey ígjøgnum aftur so mong ár seinni. Tíbetur, kom eitt nýtt lag fram fyri hana, og er hetta lagið sum finst á nýggju fløguni.

Lurtar tú eftir fløguni ber til at staðfesta, at hetta lagið er helst ikki verri enn hitt fyrra!!

### Orðini sjungaðu

Høvuðssangurin á fløguni er kortini hann, sum fløgan eitur eftir og sum tey flestu helst samantvinna við navnið Lisa Frederiksberg – Reis teg upp.

Hugskotið til henda sangin